

*Kjøtkrókur hevur funnið vegin fram til Miðlahúsið í Vágsbotni – hóast Sosialurin fyri fyrstu ferð heldur jólini í Vágsbotni. Seinastu 23 árini hava tey á Sosialinum húsast á Argjum. Jónas rópar so spendur »Hey Jólamaður!«*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Kjøtkrókur fann Miðlahúsið

**Sunnudagin 4. desember var árliga jólatiltakið á Sosialinum, har børn og vaksin fylkjast um jólatræið. Hetta var fyrstu ferð, at jólini hjá Sosialinum vórðu hildin í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

JÓLAHALD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosiaurin.fo*

– Jú mín sann! Róp kom í barnamúgvuna kring jólatræið, tí nú sást Kjøtkrókur undir gomlu útvarpshúsunum á Bryggjubakka.

So hevði kann kortini funnið Sosialin, hóast hann ikki longur húsast úti á Argjum, men í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Í huganum á nógvum av børnunum, sum plaga at vera til jólahaldið á Sosialinum, so býr Kjøtkrókur uppi á Kirkjubøreyni, tí til árliga jólahaldið sæst hann altíð koman oman Rossagøtu oman á Argjavegin, har Sosialurin hevði til húsa í 23 ár.

Í Miðlahúsinum var rómur av børnunum, tá Kjøtkrókur settist í trappuni undir gomlu leyvuni hjá William Heinesen, sum óivað hevur glett bæði hendan jólamannin og pápa og mammu hansara við, tá tey vóru børn og keyptu jólagávur í gamla handlinum hjá Zacharias Heinesen, sum eisini helt til á hesum søguliga stað.

Pakkarnir vóru sum vera man nógvir, bæði bilar og dukkur og mangt annað, sum gleða kann eitt barnahjarta.

Eisini varð dansað um jólatræið, og hart sungu børnini við um nissumammuna og nissupápan og um lítlu fittu nissuna. Sum vera man varð eisini sungið gleðilig jól og hinir kendur jólasálmarnir.

Í morgin, leygardagin, verður aftur jólahýrur í Miðlahúsinum. Tí tá Jólaskipið kemur kl 15 bjóðar Miðlahúsið seg fram sum jólahús – og dyrnar standa opnar fyri børnum og foreldrum teirra, sum leggja leiðina hendanvegin – og á skránni verður jólatónleikur og anna jólaligt.





*Sannur jólarómur var í Miðlahúsinum í Vágsbotni næstsíðsta sunnudag, tá Kjøtkrókur kom á vitjan - og hevði stórar posar við nógvum gávum til børnini…*



*Tey eru so spent so spent, øll børnini, sum bíða, til Kjøtkrókur fer at rópa upp júst teirra navn, sum stendur á jólapakkanum*